## Trý nýggj dystarmet

Melena Josephesen, Rannvá B. Andreasen og Randi S. Wardum settu allar nýtt dystarmet á kvinnulandsliðnum í fótbólti, tá spælt varð í Luksemburg seinasta vikuskiftið. Undan ferðina hevði Bára S. Klakstein úr KÍ metið við 11 dystum, men hon var ikki við á seinastu landsliðsferðini. Tað gav hinum trimum møguleika at vinna seg ovast á listan, har tær allar tríggjar eiga 12 altjóða skrásettar A-landsdystir.



## Fá pláss eftir á fótbóltsskúla

Fótbóltssambandið segði fyri stuttum, at talan í summar bert verður um tveir fótbóltsskúlar. Nevnliga á Toftum og í Sandavági. Rættiligur gravgangur hevur verið eftir plássum á skúlanum, og longu nú er skúlin á Toftum fullteknaður, verður sagt á heimasíðuni hjá FSF. Enn eru tó nøkur pláss eftir í Sandavági, verður sagt.

B36-B71:

# Eingi ráð at tapa

**Hóast góð avrik, so er B71 í botninum á stigatalvuni. B36 hevur tó ikki ráð at missa nakað, skulu teir fylgja við frammi í oddinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir javnleik móti Skála og tap í Klaksvík hevur B36 í fyrstu atløgu mist samband-ið við oddaliðini bæði.

Tað ber við sær, at B36 hesa ferð noyðist at vinna, skulu teir gera sær vónir um at toga seg uppaftur, har tað er stuttligt at vera.

Avrikini seinastu dystirnar hava víst, at hóast B36 hevur havt bóltin nógv, so hevur verið trupult at skapt veruliga opnu málmøguleikarnar, og tað er væl hugsandi, at talan aftur verður um mótstøðulið, sum fer at geva B36 stóran part av initiativinum, tá dysturin skal skapast.

So er spurningurin, um Heðin Askham hesa ferð velur at nýta fleiri mans frammi í álopinum. Higar til hevur Potemkin sitið rættiliga tungt á plássinum sum einsamallur centerforward, meðan Patrick Sunday hevur hitað beinkin, og spurningurin er tí, um vanliga 4-4-2 uppstillingin verður broytt. Verður hon tað, so skal onkur annar setast á beinkin, og tað kann verða trupult við einum hópi, sum við undantakið av Inga Højsted er fullmannaður.

Hjá B71 er Rasmuns Nielsen ikki tøkur, og spurningurin er, um Jóhannus Jensen er til reiðar at spæla, eftir at liðskiparin meiddi sær armin í dystinum móti B68. Sandoyingar hava fyri tað nógva sýnt sera góð avrik, men tapið móti B71 var dyggur smeitur á talvuni, har sandoyingar nú eru niðastir. Tí skulu stig á kontina, og so er spurningurin, hvussu Eli Hentze velur at blanda sær kortini hesaferð.



*Í fjør argaði B71 B36, tá teir móti kappingarenda tóku seinastu FM-vónina frá havnarliðnum. Hesa ferð stendur tó munandi meira upp á spæl hjá B71*

ÍF-B68:

# Tvey'arin er favorittur

**Tá báðir uppflytararnir hittast líkist ÍF einum greiðum favoritti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Ivaleyst er talan í Fuglafirði um ein dyst, sum tey flestu við kappingarbyrjan roknaðu við skuldi telja sum veruligt botnbrak.

Veruleikin í dag er tó ein annar. ÍF hevur í nógvar mátar fingið eina framúr byrjan upp á kappingarárið, og higar til eru tað bert klaksvíkingar, sum eru farnir úr Fuglafirði við einum stigi. Fyribils hevur tað sett ÍF á pláss hampuliga trygt miðskeiðis á stigatalvuni, og kunnu teir aftur hesa ferð toga trý stig til høldar á heimavølli, fer at síggja heilt ljóst út hjá teimum.

Enn verður tað tó uttan Bartal Eliasen, sum nú situr seinna karantenudagin av sær.

Hjá B68 lætnaði støðan nakað nógv, tá teir vunnu útidystin á Sandi um vikuskiftið. Enn er tó langt ífrá leyst og liðugt hjá teimum, men bæði avrik og úrslit hava verið heilt góð hjá toftamonnum seinastu tíðina, og tí er einki at ivast í, at teir ætla sær at fáa nakað burtur úr hesum dystinum eisini. Verður sæð burtur frá langtíðarskaddur van Dooren og Landing, hava toftamenn allar sínar mans tøkar.

NSÍ-Skála:

# Spenningur í grannauppgerðini

**Illa hevur gingist í hond hjá meistarunum, men eisini Skála skal hava stig í sínum stríði fyri at sleppa úr botninum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasta vikuskiftið gjørdi HB-venjarin bart, tá hann vildi hava meira ferð á sínar menn.

Og í Runavík eru tey nú farin at spyrja seg sjálvan, um Johan Nielsen fer at gera nakað av tí sama, nú NSÍ tekur ímóti Skála.

Meistararnir hava higar til verið lítið sannførandi, og seinastu tveir dystirnar hevur liðið tapt móti teimum báðum, sum tey flestu mettu, at NSÍ skuldi kappast við í oddinum.

Tað hevur lagt stórt trýst á NSÍ, sum als ikki hevur ráð til at missa nakað sum helst, nú Skála vitjar. Hinvegin kann leggjast afturat, at NSÍ tíðliga í kappingarárinum í fjør var í meinlíkari støðu, og kann liðið aftur nú seta eina langa sigursrøð saman, er oddurin ikki longur burtur enn so, at hann kann vinnast aftur.

Í fjør fór Skála úr Runavík við stigi, og kunnu teir aftur tað hesaferð, er nøgdsemið ivaleyst í lagi á Skála. Seinastu tvær ferðirnar hevur Skála eisini fingið stig við sær, og uttan iva munnu teir iðra seg um, at talan ikki gjørdist um trý stig, tá Víkingur vitjaði á stevnuni seinast.